# Leiðreglur til árligan rakstrarstuðul á mentamálaøkinum hjá Tórshavnar kommunu



**§ 1 Endamál**

Stk. 1. Endamálið er at greina mannagongd og treytir á mentamálaøkinum hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við árligan rakstrarstuðul (ískoyti) til ymiskar felagsskapir, sum ríka og menna mentanarlívið í kommununi og sum stuðla undir visjónina fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Stuðul verður veittur samsvarandi játtan á árligu fíggjarætlan kommununnar av hesum kontum:
5362 Stuðul til sjónleik,
5363 Stuðul til tónleik,
5364 Stuðul til mynd- og filmslist,
5365 Stuðul til ítrótt og
5366 Stuðul annars.

**§ 2 Virksemi, sum kann fáa stuðul**

Stk. 1. Rakstrarstuðul kann verða latin til virksemi innan hesi endamál:
a. Listarligt og mentanarligt virksemi
b. Frítíðarvirksemi sum t.d. ítrótt og skótar

Stk. 2. Treyt er, at felagsskapir sjálvir hava eina hóskandi eginíløgu viðvíkjandi ískoyti til fasta raksturin av felagsskapinum, so sum limagjøld, tiltøk, sølu o.a., umframt sjálvboðið arbeiði. Harumframt skal stuðulin vera í samsvari við vav og slag av virksemi, sum felagsskapurin rekur.

Stk. 3. Felagsskapir fyri børn og ung fáa hægri raðfesting enn vaksnamannafelagsskapir.

Stk. 4. Stuðulin kann vera ein bruttoupphædd ella ein grundupphædd og eitt gjald pr. lim aftrat.

**§ 3 Raðfestingar**

Stk. 1. Mentamálanevndin setur á hvørjum ári upphædd av til ávíst stuðulsøki. Endamálið er at raðfesta og kveikja nýskapan innan mentan og list.

**§ 4 Umsókn, viðgerð og treytir**

Stk. 1. Umsóknir um rakstrarstuðul verða viðgjørdar, so hvørt tær koma inn. Mentamálanevndin viðger stuðulsumsóknir á regluligu fundum sínum.

Stk. 2. Umsókn skal verða skrivað á serstakt umsóknarblað, sum kann heintast á heimasíðu kommununnar.

Stk. 3. Mentamáladeildin tekur ímóti umsóknum og fyrireikar tær til viðgerðar í Mentamálanevndini. Mentamálanevndin tekur avgerð um allar umsóknir við tilmæli frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum.

Stk. 4. Kommunan skal í seinasta lagi 4 mánaðir eftir roknskaparlok hjá einstaka felagsskapinum fáa grannskoðaðan roknskap og ársfrásøgn, herundir við frágreiðing um tal av limum, virksemi í árinum og ætlanir fyri framman, umframt hvussu felagsskapurin arbeiðir fyri at tryggja framhaldandi menning av sjálvbodnum virksemi í felagnum.

Stk. 5. Kommunan kann biðja felagsskapin um nærri frágreiðingar og skjalprógv í sambandi við stuðulin.

Stk. 5. Møguliga ónýttur peningur verður at rinda kommununi aftur.

Stk. 6. Álagt verður umsøkjarum, sum fáa rakstrarstuðul, at tey í skráum og aðrastaðni tilskila, at Tórshavnar kommuna hevur veitt stuðul.

**§ 5 Viðgerð og avgerð um stuðul**

Stk. 1. Mentamálanevndin kann, um serligar umstøður tala fyri tí, víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð.

Stk. 2. Hesar leiðreglur koma í gildi dagin eftir, at mentamálanevndin hevur samtykt tær.


Leiðreglur samtyktar av Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs 16. desember 2015